Aðalstjóri til Uttanríkis- og fiskimálaráðið

Søkt verður eftir einum dugnaligum og framskygdum aðalstjóra til Uttanríkis- og fiskimálaráðið

STARVIÐ SUM AÐALSTJÓRI

Aðalstjórin er ovasti ráðgevi hjá landsstýrisfólkinum og hevur ábyrgd av dagligu leiðsluni, menningini og rakstrinum í Uttanríkis- og fiskimálaráðnum (UFMR). UFMR fevnir um Uttanríkistænastuna og Fiskivinnudeildina. Stovnar undir UFMR eru Havstovan og Vørn. Aðalstjórin er ovasti stjóri fyri UFMR.

Aðalstjórin ráðgevur í fakligum spurningum og politiskum viðurskiftum í sambandi við, at mál hjá landsstýrinum skulu fremjast.

Aðalstjórin skal tryggja landsstýrisfólkinum dygdargóða tænastu í øllum tiltøkum og spurningum, sum landsstýrisfólkið fær. Tað er somuleiðis ábyrgdin hjá aðalstjóranum at tryggja, at avgerðir eru lógligar og rættar.

Aðalstjórin skal hava gott innlit í politisk og fyrisitingarlig viðurskifti og vitan um tær treytir, ið eru avgerandi í einari politiskari fyrisiting.

Við støði í leiklutinum er týdningarmikið, at landstýrisfólkið og aðalstjórin hava fult álit sínámillum. Tey eiga at hava eina felags fatan av leiðslurúminum hvør hjá øðrum soleiðis, at tey altíð vita hvør av øðrum í gerandisdegnum.

STUTT UM LANDSFYRISITINGINA

Landsfyrisitingin er embætisverkið hjá landstýrinum. Hon fevnir um sjey stjórnarráð og 140 starvsfólk. Í øllum stjórnarráðum verður dentur lagdur á at skapa eina fakliga sterka og dynamiska fyrisiting. Sum liður í hesum leggur fyrisitingin upp til møguleikan hjá embætisverkinum at skifta millum ráð og fáa ymiskar royndir úr allari fyrisitingini. Hesin møguleiki er somuleiðis galdandi fyri aðalstjórar.

HØVUÐSUPPGÁVUR

Aðalstjórin skal leiða og samskipa arbeiðið í UFMR. Høvuðsuppgávurnar eru at:

- Samskipa og fyrireika uppgávur innan málsøkini hjá UFMR
- Fyrireika lógir, kunngerðir og reglugerðir innan málsøkið.
- Leiða arbeiðið í UFMR og tryggja, at stjórnarráðið virkar í samsvari við politisk mál.
- Hava eftirlit við stovnum undir UFMR.

FØRLEIKAKRØV OG VÆNTANIR

Starvið krevur útbúgving frá hægri lærustovni á hædd við kandidat-/masterprógv, týðandi og viðkomandi leiðsluroyndir í mun til uppgávurnar, sum starvið fevnir um.

Væntað verður, at umsøkjarin megnar at arbeiða undir trýsti, hevur ein mennandi leiðslustíl og er slóðbrótandi í strategiskum arbeiði.

Tað er av týdningi, at umsøkjarin megnar at seta greið mál, skapa úrslit og dugir at raðfesta og deila út uppgávur. Umsøkjarin má hava góðar samskiftisførleikar bæði munnliga og skrivliga.

VILT TÚ HOYRA MEIRA?

Hevur tú spurningar ella hug at hoyra meira um starvið, ert tú vælkomin at venda tær til John Rajani, løgmansstjóra, á tel. 55 50 16.

SETANARVIÐURSKIFTI

Aðalstjórastarvið er sáttmálasett.

Starvið er flokkað í 39. lønarflokki sambært sáttmála millum Tænastumannafelag Landsins og Fíggjarmálaráðið. Lønin er í løtuni 74.036,84 kr. um mánaðin umframt eina aðalstjóraviðbót á 6.941 kr.

Starvið er áramálssett í 7 ár við møguleika fyri leingjan í upp til 3 ár.

Fyri áramálssetan verður veitt ein mánaðarlig viðbót upp til 20% av grundlønini.

Umframt sáttmálasettu lønina verður veitt 15% í eftirløn av samlaðu lønini.

Er tann, ið verður settur, longu tænastumaður, verður starvið tó sett sum tænastumannastarv.

Setanarøkið fevnir um UFMR, stovnar undir tí, Løgmansskrivstovuna og hini stjórnarráðini. Tænastustaðurin er í løtuni UFMR.

SØK STARVIÐ HER

Um hetta ljóðar sum eitt starv fyri teg, kanst tú senda eina umsókn við upplýsingum um útbúgving, lívsgongdarlýsing og møguligum viðmælum til starv@tinganes.fo.

Freistin er **sunnudagin 15. novembur 2026.**

Starvið verður sett 1. januar 2027 ella eftir nærri avtalu.

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

LØGMANSSKRIVSTOVAN
Prime Minister's Office